# Aftursvar til Kára Bæk um Koda

**PETUR JACOBSEN**
fyrrverandi útvarpsstjóri - í 8 ár - og eins og Kári Bæk, limur í Koda



Eg havi lítlan hug at brúka orku til ein so óvitandi persón í hesum máli sum Kára Bæk; men tá hann beinleiðis kallar meg fyri grenj, má eg gera nakrar viðmerkingar.

Tað er ongantíð komið fram, at føroysku loftmiðlarnir ikki vilja gjalda fyri at spæla vardan tónleik! Tað, sum vit vilja við okkara áheitan, er at eitt rættvísari býti skal verða av tí, sum goldið verður, og at tað ikki skal vera 100 ferðir dýrari at senda føroyskan tónleik í sjónvarpi enn at endurvarpa alt tað útlendska!

**Lokalvørp í Føroyum**
Reglurnar hjá Koda eru ógvuliga flótandi í praksis, tað er ógvuliga ymiskt, hvat teir ymisku loftmiðlarnir í danska ríkinum skulu gjalda.

Í Føroyum skulu vit eftir reglunum fyri lokalsjónvarp gjalda somu upphædd sum støðir í Danmark. Tað er líka mikið um tað eru 5.000 hyggjarar ella t.d. 2 milliónir! Er tað grenj ikki at góðtaka at gjalda 400 ferðir meira pr. hyggjara?

Um vit gera eitt klassiskt lokalsjónvarp í Føroyum, sum spælir vardan tónleik, eru somu órættvísu reglur galdandi.

Danskar reglur og danskir prísir fyri Føroyar – tað er órættvíst, og einki føroyskt lokalsjónvarp fer at hava ráð at gjalda danskar takstir. Høvdu danskarar góðtikið at goldið takstir galdandi fyri 600 mió fólk?

Tað er heldur einki samanhang millum prísirnar, sum teir ymisku føroysku loftmiðlarnir skulu gjalda pr. hyggjara/lurtara, og als ikki um vit eisini samanlíkna við teir donsku loftmiðlarnar. Tað er so nógv bíligast at endurvarpa útlendskar rásir! So kann eg afturat nevna internetstreaming, tað er so nógv dýrast - tað er eingin felagsnevnari!

Onkur má duga at síggja tað órættvísa í hesum! Koda er ikki eitt lítið fitt felag hjá sangskrivarum, har arbeiða 100 fólk við nógvum fínum útbúgvingum, Koda er ein stór fyritøka, sum at síggja til fegin vil vinna pening - úr Føroyum!

**Býti av samsýning úr Føroyum**
Vit kunnu seta eitt roknistykki upp, sum vísir hvussu skeiv fordeilingin er fyri føroyskar tekst/tónasmiðir og tónleikarar.

Koda krevur kr. 2.600.000,- úr Føroyum, men tað, sum samlað kemur aftur í umfar í Føroyum, er helst í mesta lagi umleið kr. 600.000,- t.v.s. 20-25%.

Samlað í 2007 fær Koda kr. 484.410.489,- inn, av hesum er gjald til útlandið umleið 210.000.000,-. Eftir í umfari í Danmark eru umleið kr. 275.000.000,- t.v.s. Knapt 60%

Av samlaða gjaldinum, kr. 32.000.000,- sum Koda fær úr útlandinum, gjalda vit í Føroyum kr. 2.600.000,- tað vil siga meira enn 8%, í samlaðu upphæddini frá øllum heiminum, "Er ongin sum vaknar her!!!"

Tað mangla umleið kr. 1.000.000,- um árið í føroyska tónleikaumhvørvinum, sum Koda deilir út til danskarar. Hóast Kári Bæk skrivar, at vit høvdu fingið meira aftur, um vit spældu meira føroyskan tónleik, og tað hevði verið ynskiligt, so er tað ikki so í veruleikanum; hann átti at sett seg inn í reglurnar fyri lokal út- og sjónvarp, áðrenn hann fer í bløðini við sínum ákærum.

**Felagið Føroysk Tónaskøld**
At Kári Bæk, Kristian Blak o. o. onga broyting vilja hava í verandi skipan kann bert koma av, at Koda sendir eina "narrisut" upp á umleið kr. 150.000,- um árið til Felagið Føroysk Tónaskøld, sum teir suverent umsita eftir egnum huga - helst meir enn til sítt egna umráði, og so er tøgn.

Uppskot eigur at verða lagt fram, at ongin skal sleppa at sita í nevndini í FFT í meira enn 4 ár í senn og so vera úti í minst 8 ár, hetta fyri at fyribyrgja egin áhugamál í felagnum.

**Populertónleikurin fíggjar partiturtónleikin**
Populer tónleikurin betalur so at siga allan peningin úr Føroyum umvegis út- og sjónvørpini og partitur tónleikurin fær meginpartin av ágóðanum, hetta er ikki rættvíst og so slett ikki yvirfyri øllum popp-arunum; men ongin talar at, og tí heldur tað fram og versnar, helst uttan betri vitandi.

**Gramex**
Vit kunnu taka hin felagskapin, Gramex, sum í áravís hava kravt okursprís frá lokalvørpunum í Føroyum, men sum í seinastuni hava fingið harraboð frá Ophavsretslicensnævnet um at hava sama takst fyri lokalradio um alt ríkið.

Danmarks Radio hevur samlað í 2007 goldið kr. 53.730.235,- og donsk lokalradio kr. 19.186.323,-

Kringvarp Føroya hevur í 2007 goldið kr. 210.000,- til Gramex. Rás2 og Lindin kr. 446.940,-

Í Føroyum gjalda lokalradio meira í part enn almenna Kringvarpið, hvør kallar okkum fyri grenj?

Nei Kári Bæk, best er at bæði tú og Kristian Blak siga sum minst í hesum máli. Tað kundi hent, at tit fingu okkurt at grenja um, Rás 2 hevur, í mínari tíð, goldið fleiri milliónir til Koda/Gramex. Kristian Blak veit mína meining um, hvussu hann umsitur FFT, tað havi eg átalað fyrr.

**Áheitan**
Til allar tónasmiðir og tónleikarar í Føroyum, tit geva FFT og Koda meira enn 1 mill.kr. um árið av tykkara pengum, hava tit ráð at vera so gávumildir? Stovnið tykkara egna felag, her eru nógvir pengar at heinta, sum tit av røttum eiga.

Øll tit, sum hava áhuga í hesum evni, eru vælkomin at senda mær teldupost á petur@steinamork.fo

Hetta er skrivað sum mín persónliga viðmerking til Kára Bæk og ikki fyri allar miðlarnar.

# Sigurd Simonsen og kommunusamanlegging av Gøtu, Leirvík og Fuglafirði

**SIGNAR Á BRÚNNI**



Eftir ta samrøðu, ið Sigurd Simonsen hevði við útvarpið um kommunusamanlegging av komununum Gøta, Leirvík og Fuglafirði, eru tey mong, ið hava spurt meg, hví fuglfirðingar eru so hart ímóti kommunusamanlegging.

Eg spyrji, hví tey málbera seg soleiðis?

Svarið er, at tey hava hoyrt, hvat býráðsformaðurin í Fuglafirði segði við útvarpið.

Eg sigi so teimum, at orsøkin til at fleiri av býráðslimunum søgdu nei, var hon, at tíðarskeiðið hjá býráðnum varð um at verða runnið, tí átti málið at verða tikið upp av tí næsta býráðnum.

Ná, er tað soleiðis tað hongur saman, tað er nakað heilt annað.

M. a. tí havi eg sagt, at frásøgn býráðsformansins var villleiðandi, og tað haldi eg fast við.

Annars skal tað ikki verða nakað dulsmál, at eg helt tað vera so løgið, at málið um kommunusamanlegging skuldi haldast fyri afturlatnum hurðum, so sum býráðsformaðurin hevði skipað fyri. Persónsmál og líknandi plaga at verða hildin fyri afturlatnum hurðum Hetta er ikki nakað persónsmál, tí átti málið at verið viðgjørt á almennum fundi.

Men tá ið tað nú gjørdist soleiðis, sum býráðsformaðurin vildi hava tað, so skilji eg als ikki, at hann sum tann fyrsti almannakunnger, hvat úrslitið gjørdist á fundinum.

Og uppaftur verri tykist tað at verða, tá ið hann heldur parti av upplýsingum aftur, sum var orsøkin til niðurstøðuna á fundinum.

Sigurd sigur í síni rættleiðing, at niðurstøðan varð send Leirvík og Gøtu og var sostatt almannakunngjørt. Nei, tað er ikki ein almannakunngerð, men ein kunning til bygdaráðini í grannakommununum. Tey, ið hoyrdu frásøgn býráðsformansins í útarpinum, hava onga nærri upplýsinar fingið.

Skrivið, ið verður sent Gøtu og Leirvík, er væl orðað og vísir á, hvat veruliga hendi á fundinum. Í tí verður sagt, at málið kundi vera standandi opið til næsta býráð at umrøða. Hetta var eisini innihaldið í tí, sum eg og aðrir býráðslimir bóru fram á fundinum.

Tá ið eg í grein míni havi sagt, at vit vóru fleiri býráðslimir, ið fleiri ferðir áður mæltu til, at skipa fyri fundum við kommunusstýrini í grannabygdunum at umrøða felags áhugamál, so er tað sjálvandi rætt, men hetta varð noktað okkum fyrst og fremst av býráðsformanninum.

Lítið ella einki hendi á nevnda øki, og tað kundi tað av góðum grundum heldur ikki, tí ein treyt fyri at kunna taka støðu í einum so stórum máli er upplýsandi tilfar og so hoyra, hvat umboð kommunurnar hava at føra fram um eina møguliga kommunusamanlegging. Einki av hesum varð gjørt, tí eru vit komin so stutt.

Í greinini sigur Sigurð S., at eitt sitandi kommunustýri kann ikki atkvøða um, hvat eitt annað býráð skal atkvøða um ella gera. Tá ið eg las hesa reglu, helt eg Sigurd skemtaði, ella vóru villur í tekstinum, tí Fuglafjarðar býráð hevur gjørt tað í einstøkum førum, hóast býráðslimir gjørdu vart við skeivleikan. Undanfarna býráð samtykti at rinda ávísa upphædd til felagsskap, ið skuldi fara undir bygging, og at hesin peningur skuldi rindast í 2009 og 2010. Tí lurtaðu Sigurd og hansara fólk ikki eftir, men atkvøttu fyri málinum, so tað varð samtykt.

Jú, sanniliga hevur Sigurd verið villleiðandi í síni frásøgn og eftir rættleiðingina til mín, kann eg bert staðfesta, at hann syngur uppaftur falskari, enn hann hevur gjørt frammanundan.

# Morgunlesturin – fimleikurin

**SIGVALD KRISTIANSEN**



Morgunlesturin, sum hevur verið endursendur áðrenn tíðindini kl. 10 fyrrapart, og fimleikurin, sum hevur verið sendur aftaná tíðindini, hava verið fastir tættir í tí dagliga lívinum hjá teimum eldru í áravís umframt hjá nógvum í yngri aldursbólkum. Nú knappliga fara hesar báðar sendingar av skránni og verða vístar til internetið. Hetta er sera óheppið, og serliga fyri fólk í pensjónsaldri. Munnu tey, sum leggja skránna til rættis, vita, hvussu nógv gomul fólk hava teldu? Og duga at brúka hana? Hóast tað nú er farið undir at læra eldri fólk at brúka teldu.

Tað eru ikki nógvar sendingar á skránni í kringvarpinum, sum beinleiðis venda sær til tann eldra aldursbólkin, men hesar báðar nevndu sendingar hava tey eldru tikið til sín, og tey leggja sín fyrrapart av degnum til rættis eftir hesum sendingum. Og hví so taka tær frá teimum? Tað eru hóast alt út ímóti 6000 fólk, sum eru í pensjónistaaldri.

Nógv av teimum eldru eru ikki so tíðliga á fótum, at tey hoyra morgunlesturin kl. 7, tí kom tað væl við, at endursending var áðrenn kl. 10, eitt gott orð frá morgni av hevur stóran týdning fyri andaliga lívið hjá okkum øllum, og tað er við til at styrkja okkum mentalt, eins og fimleikurin, sum nógv eldri gjørdu brúk av, er við til at styrkja okkum likamliga.

Nú eru hesar sendingar tiknar av skránni. Hví skal altíð skerjast á eldraøkinum fyrst? Dagligt likamlig rørsla er sera týdningarmikil fyri førleika og vælveru, eins og dagligur sálmasangur og lestur eru andaliga uppbyggjandi. Hesar báðar sendingar eru við til at halda okkum eldri í form, so lat okkum framvegis varð-veita tær, tað er okkara ynski.

Tónleikur er góður í mangar mátar, hann hava vit ríkiligt av allan dagin í kringvarpinum, men hann tolir at skerjast ella koyrast út á internetið. Er ein samrøða ella eitt prát við onkran, so skal eitt lag spælast fyrst, og áðrenn so við-komandi fær orðið, skal enn eitt lag afturat spælast fyrst. Er tónleikur bara ífylla? Í slíkum førum ørkymlar tónleikurin meira enn hann gagnar. Nógvir minuttir fara soleiðis næstan til spillis, her kann sparast tíð, um hetta er trupulleikin. Morgunlesturin og fimleikurin gera gagn, og tað hevði verið gott, um kringvarpið framvegis vildi gjørt sítt til at gleða ein stóran part av sínum lurtaraskara.